FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 13. august 2021
J. nr.: 21/15476

Svar uppá fyrispurning nr. 52-003/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, settur, Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Suðuroyartunnilin.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at kalla inn til fundar um politiska semju um Suðuroyartunnilin?
2. Hvussu gongur við undankanningunum til Suðuroyartunnilin, og nær eru tær lidnar?
3. Nær kann væntast, at klárt er at bora?
4. Er ætlanin framvegis, at peningur fyrst skal játtast frá 2025?
5. Kemur ætlanin, at tað skal vera koyrandi í 2030 at halda?

Svar til fyrispurning nr. 1
Støða er ikki tikin til, nær flokkarnir verða kallaðir saman at viðgera verkætlanina Suðuroyartunnilin og ymiskar týðandi spurningar og viðurskifti í sambandi við hana. Fleiri av viðurskiftunum kunnu illa viðgerast, fyrr enn fleiri forkanningar og fyrireikingar eru gjørdar og fyrr enn ein trygdarmeting fyriliggur av tunlinum. Miðað verður eftir einari felags semju um Suðuroyartunnilin eins og gjørt varð í sambandi við Eysturoyar- og Sandoyartunnilin.

Svar til fyrispurning nr. 2
Undankanningarnar og fyrireikingarnar í sambandi við Suðuroyartunnilin ganga eftir ætlan. Tað hevur gingið væl at gera seismiskar kanningar og at gera borihol til kanningar av jarðfrøðini bæði í 2020 og 2021. Kanningarnar eru kortini ikki liðugt greinaðar og viðgjørdar enn. Neyðugt verður at kanna úrslitini betur og at kanna úrslitini frá jarðfrøðiligu kanningunum í 2020 og 2021 saman.

Arbeitt verður eisini við at kanna búskaparliga partin av verkætlanini við samfelagsligum-, kostnyttu- og CO2-greiningum. Ætlanin er eisini at kanna møguligar fíggingarleistir í sambandi við verkætlanina. Í sambandi við tunnilin verður eisini neyðugt at gera eina trygdarmeting (váðameting), náttúru- og fornfrøðikanningar v.m., og ætlanin er eisini at byrja tað arbeiðið í 2021.

Gongur alt væl í sambandi við forkanningarnar og fyrireikingarnar í sambandi við tunnilin, og taka óvæntað viðurskifti seg ikki upp, verður miðað eftir, at arbeiðið er komið rættiliga langt í ár og at síðstu forkanningarnar og fyrireikingarnar verða gjørdar í 2022.

Svar til fyrispurning nr. 3
Til ber ikki at siga við vissu, nær klárt verður at bora Suðuroyartunnilin. Hetta er millum annað treytað av, hvussu tað fer at ganga at gera tær undankanningar og fyrireikingar, sum eru eftir at gera, og av hvussu tað fer at ganga at fíggja verkætlanina og at prosjektera tunnilin.

Svar til fyrispurning nr. 4
Løgtingið hevur játtað 5 mió. kr. til forkanningar og fyrireikingar í sambandi við Suðuroyartunnilin frá 2020. Landsstýrið hevur eisini á langtíðarløguætlanini hjá landinum frá 2025 sett 100 mió. kr. árliga av til partafelagið, sum ætlandi skal standa fyri verkætlanini. Landsstýrið og samgongan hava ikki ætlanir um at broyta hesa raðfesting.

Svar til fyrispurning nr. 5
Politiska ynskið er, at koyrandi verður í 2030. Enn er ov tíðliga at siga við vissu, um tann ætlanin heldur.

Tinganes, 13. august 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum